# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jenis av Rana, løgtingsmaður

**Svarari:** Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

**Evni:** Bíleggingar- og eftirlitsskipanin á suðuroyarleiðini

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv hevur nýggja bíleggingar- og eftirlitsskipanin á suðuroyarleiðini kostað tí almenna og Strandferðsluni higartil?
2. Hvussu nógv verður rindað fyri bíleggingar- og eftirlitsskipanina um mánaðin?
3. Hvussu mong starvsfólk eru dagliga knýtt at nýggju skipanini?
4. Eru útlit til, at kostnaðurin minkar, sum tíðin líður?
5. Er vissa fingin um, at ikki aðrar skilabetri, vitanargrundaðar, minni órógvandi og bíligari skipanir eru (eitt hugsað dømi er t.d. mynda- og videoskipanirnar, sum verða brúktar í gjaldstunlunum)?

**Viðmerkingar.**
Í júst hesum døgum, har orð (s)um sparingar, nýskipanir (reformar), haldføri, effektiviseringar, nýskipanarnevnd v.m. flúgva um oyru okkara, hevði verið áhugavert at frætt, um samband er millum teori og praksis á økinum. Er t.d. skil í tí "kontrollsystemi", sum er sett í verk á suðuroyarleiðini, ella er talan um, sum mong vilja verða við, tað bera oyðsl.

**Á Løgtingi, 10. september 2025**

Jenis av Rana